Tað fer at røkka ella støkka

Klaksvíkingar missa takið, um teir ikki fáa stig við úr Runavík, har heimaliðið er betri skipað enn nakrantíð áður

UPPTAKT
Jóannes Hansen

KÍ skal til Runavíkar í morgin. Undan dystinum standa bæði liðini saman við øllum hinum 1. deildarfeløgunum í kapping við HM finaluna, sum er á skránni á middegi. Um talan verður um longda leiktíð, so fer ivaleyst eisini at knípa hjá áskoðarunum.

– Okkara spælarar møta altíð klokkan trý korter til tvey. Tað hava teir eisini fingið boð um at gera hesa ferð, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ. Liðið hjá honum er væl skipað, og teir gera nógv færri mistøk, enn NSÍ áður hevur gjørt. Tað hevur borið við sær, at NSÍ saman við HB er fremst eftir átta tey fyrstu umførini.

KÍ hevur verið væl meiri óstøðugt, enn NSÍ hevur verið. Tí má NSÍ roknast sum favorittur hesa ferð, men NSÍ venjarin er ikki heilt álvuligur:

– Talan er um seks stiga dyst, sum tað plagar at verða tikið til. Vit hava seytjan stig, og KÍ hevur trettan. Um vit vinna, so verður munurin sjey stig. Um teir vinna, so verður munurin bara eitt stig. Tað vita klaksvíkingar, og eg rokni við, at teir fara at leggja heilt nógv fyri.

Hjá NSÍ er eingin spælari leikbannaður. Djóni N. Joensen er farin at venja aftur, men hann verður ikki við. Óli Hansen og Kári Hansen hava smávegis trupulleikar, sum hava verið orsøk til, at teir ikki hava vant so støðugt, men teir verða við í morgin.

Eingin norðmaður

Stóru fótbóltstíðindini í vikuni vóru, at KÍ hevur gjørt avtalu við ein Sogndal spælara. Men hann verður ikki við í Runavík:

– Vit høvdu fegnir viljað havt, at hann var við, men tað ber honum ikki til at koma henda vegin enn. Hann verður heldur ikki við á Skála, men hann verður við, tá HB kemur til Klaksvíkar 4. august, sigur Karl Birgir Isaksen, formaður í fótbóltsdeildini hjá KÍ.

Eingin KÍ spælari er leikbannaður. Síðsta vikuskifti var Atli Danielsen burturstaddur. Hann er tøkur aftur. Spurningurin er so, hvussu Kurt Mørkøre fer at blanda kortini. Ímóti VB megnaði KÍ ikki at fáa mál, og verjan var ikki undir serligum trýsti.

Í morgin verður mótstøðuliðið meiri ágangandi. Men talan verður neyvan um støðugt trýst. NSÍ plagar at halda nógvar spælarar aftarlaga á vøllinum, og so dúva teir upp á mótálop. Jónstein Petersen, sum er skjótur í vinstra borði, hevur ofta skorað ímóti KÍ. Í morgin fæst at síggja, hvat KÍ venjarin hevur í posanum til verju og álop. Tað fæst at síggja, tá Ronaldo, Rivaldo og allir teir hava verið at sæð í tveir tímar!



Nú má røkka ella støkka hjá klaksvíkingum

1. deild kvinnur

		d	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	KÍ	7	6	-	0	-	1	39	6	33	18
2	B36	7	5	-	0	-	2	17	8	9	15
3	B68	7	4	-	0	-	3	14	15	-1	12
4	HB	7	2	-	1	-	4	14	22	-8	7
5	GÍ	8	0	-	1	-	7	9	42	-33	1

Støðan, 1. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	HB	8	5	-	2	-	1	18	5	13	17
2	NSÍ	8	5	-	2	-	1	17	11	6	17
3	B68	8	4	-	3	-	1	13	10	3	15
4	B36	8	4	-	1	-	3	27	15	12	13
5	KÍ	8	4	-	1	-	3	20	11	9	13
6	GÍ	8	4	-	1	-	3	13	14	-1	13
7	VB	8	2	-	3	-	3	4	5	-1	9
8	EB/Streymur	8	2	-	1	-	5	9	17	-8	7
9	TB	8	1	-	2	-	5	8	29	-21	5
10	Skála	8	0	-	2	-	6	5	17	-12	2

Støðan, 2. deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	FS V	8	5	-	2	-	1	27	8	19	17
2	Sumba	8	4	-	3	-	1	13	9	4	15
3	ÍF	8	4	-	1	-	3	21	12	9	13
4	LÍF	8	4	-	1	-	3	17	14	3	13
5	KÍ	8	3	-	3	-	2	14	14	0	12
6	HB	8	3	-	1	-	4	13	13	0	10
7	B71	8	2	-	3	-	3	9	8	1	9
8	B36	7	2	-	3	-	2	9	14	-5	9
9	NSÍ	8	2	-	1	-	5	5	13	-8	7
10	VB	7	1	-	0	-	6	4	27	-23	3

NSÍ til Íslands at fyrireika seg

Finalistarnir í steypakappingini skulu venja á Akureyri, har teir eisini skulu spæla tveir dystir

FYRIREIKINGAR
Jóannes Hansen

NSÍ hevur undanvind í løtuni. Teir eru oddalið í 1. deild, og teir eru í steypafinaluni, sum verður ímóti HB ólavsøkudag. Undan summarsteðginum skulu teir spæla tveir landskappingardystir. Tann fyrri verður nú sunnudagin á heimavølli ímóti KÍ, og tann seinni verður annan sunnudag á heimavølli ímóti B36.

Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ, er rímuligt væl nøgdur við gongdina higartil, men hann vísir staðiliga á, at tað verður neyðugt at stríðast fyri øllum stigunum, og at uppgávurnar eru torførar.

– Skulu vit framvegis vera við í toppinum, so skulu vit vinna heimadystirnar, og tað verður ikki lætt – hvørki ímóti KÍ ella B36, men eg vóni og vænti, at spælararnir fara at gera tað, sum teir eru mentir.

Íslandsferðin

Tá 10. umfarið verður liðugt spælt, fara NSÍ spælararnir í summarfrí.

– Spælararnir hava vant síðani síðst í januar. Um teir skulu megna at stríðast inntil fyrst í oktober, so er neyðugt hjá teimum at kobla úr í nakrar dagar, ásannar NSÍ venjarin.

Tá NSÍ spælararnir hittast eftir summarsteðgin, skulu teir til Íslands. Teir skulu til Akureyrar, har teir skulu halda til í felagshølunum hjá Þór, og har teir skulu venja á góða grasvøllinum, sum er á Akureyri. Farið verður úr Føroyum 17. juli, og NSÍ ferðalagið verður aftur í Føroyum 25. juli. Umframt átjan spælarar og tveir venjarar verða fleiri onnur við í ferðalagnum, sum fer at telja 28 fólk.

Tað er greitt, at NSÍ skal spæla ein venjingardyst ímóti Þór, sum er í bestu deildini. Ein annar venjingardystur verður á skránni, men enn er ikki greitt, hvørjum hann verður ímóti. Á Akureyri er umframt Þór eitt annað felag í bestu deildini. Tað eitur KA. Tað er møguligt, at dysturin verður ímóti teimum, ella kanska verður hann ímóti Leiftri, sum nú er í næstbestu deildini.

NSÍ málverjin, Jens Martin Knudsen, var í fleiri ár málverji hjá Leiftri, umframt at hann eisini eitt ár var hjálparvenjari hjá Páll Guðlaugsson, sum hevði ábyrgdina av liðnum á Ólafsfirði.

Smuk indsats mod Sverige og Grækenland

Rapport før onsdagens kampe i bridge-EM

BRIDGE
Svend Novrup

OBS! OBS! Først skal jeg gøre opmærksom på, at der blev fundet en scorefejl mod Ukraine, så vores sejr blev på 22-8 og ikke 21-9!!

Efter tordenvejr i forgårs og regnvejr tirsdag aften er temperaturen endelig dalet i Salsomaggiore. Ca 10 grader, og alligevel er det stadig godt 30 grader, men nu med lidt vind og meget behageligt. De færøske spillere er fortsat i perlehumør, holder moralen højt og fysikken i top. De kan mærke, at det begynder at knibe for mange af de øvrige hold, og det gør dem endnu mere opsat paa at forbedre placeringen til sidst.

Holdet bor paa hotel med islænderne og ingen andre, og da islænderne normalt er i byen om aftenen, har vi det for os selv. Tirsdag aften optog vi hele stueetagen, mens det regnede. Vi sang sange (bl a en skrevet til lejligheden), drak kaffe og hvidvand(!), spillede backgammon, skak og bridge og diskuterede spil og meldinger. Hygge og sammenhold som hele vejen, og et ikke uvæsentligt emne er forberedelserne for NM næste år i Torshavn, som mange allerede tænker på.

Forinden havde holdet gjort det godt mod Sverige, som kæmper desperat for at nå op i top-5, men ikke fik noget forærende mod færingerne. Med to spil tilbage var stillingen helt lige, men et svensk sving i sidste sekund gav nederlag 13-17. Alligevel en ny flot indsats, og Færøerne ligger i øjeblikket over det store mål, som holdet satte sig før EM: 12 i snit pr. kamp. Fra start var det omkring 11, men i anden uge, hvor den bedste fysik og største motivation er meget vigtig, er det steget til over 12.

Onsdag morgen stod det igen næsten lige før de to sidste spil mod Grækenland, men et gamesving i spil 19 betød nederlag 11-19. Alligevel igen over forventning mod en af de nationer, der er i stærk fremmarch. Resultatet betød også en enkelt plads' avancement, da Belgien tabte 0-25 til Bulgarien, og meget interessant har det dannet sig et felt, der kæmper om placeringerne 31-34: 31. Schweiz 358. 32. Jugoslavien 346. 33. Færøerne 341. 34. Belgien 340. Der er mere end 50 p ned til nr. 35, Liechtenstein med 288, så færingerne er definitivt ikke ikke i det nederste lag i Europa.

Onsdag middag tog vi fat paa Holland, som stiller op med flere af de spillere, der blev verdensmestre i 1993, og som er en hård opgave, hvorefter det onsdag aften gælder Belgien i et mere end interessant opgør. Den mest fremtrædende belgiske journalist har hele vejen revet sig i håret og forklaret mig, at belgierne aldrig havde regnet med at skulle passere os i stillingen, men det har de nu gjort tre gange for nedadgående og to gange for opadgående. Han kan overhovedet ikke holde tanken ud om, at det måske skulle standse her!

Damerne sad over og skal heller ikke spille i dagens anden runde, hvor de har deres bye og faar 18 p. I aften skal de møde Spanien, som på deres meldekort angiver, at åbning 2 Klør spørger efter røvhuller (asses i stedet for aces!!). Svarene bliver interessante.

Fortsat mange tak for de mange positive mails og opmuntringer. Holdet føler, at det har en varm støtte hjemmefra og forsøger at gøre det bedst muligt og leve op til det.

Selv om det gaar skidt for damerne resultatmæssigt, er der lyspunkter at finde. På dette spil fra kampen mod Tyrkiet sad Maria – Laila N-S:

V/Alle

	¨ B52 ¢ KB7 ò ED653 é 64	
¨ K643 ¢ D52 ò 982 é 1052		¨ ED1098 ¢ 1064 ò K é EK73
	¨ 7 ¢ E983 ò B1074 é DB98	

Vest	Nord	Øst	Syd
pas	pas	1¨	pas
2Sp	pas	4¨	pas
pas	pas		

Laila startede med Ru B til Ru E, og Maria fortsatte farven til trumf. Øst trak Kl EK og spillede en tredje klør, som Syd vandt for at spille en fjerde klør. Øst var naturligvis bange for at skulle afgive stik til ¨7 og trumfede med ¨K. Derefter trak hun ¨ED og skulle af med endnu et trumf- og tre hjerterstik. Tre for lidt og 300 til Færøerne. Vest fortalte vist nok Øst et og andet om det smukke i at trække trumf!

Brasilia aftur í finaluni

Superstjørnan Ronaldo skeyt einasta málið í hálvfinaluni ímóti Turkalandi, og tryggjaði harvið Brasilia finaluplass triðju ferð upp í slag.

HM-FÓTBÓLTUR
Páll Holm Johannesen

Brasilia er enn einaferð í HM-finaluni. Eftir sigurin ímóti Turkalandi í hálvfinaluni, verður finalan millum mætu fótbóltstjóðirnar Týsk land og Brasilia. Sigurin á Turkalandi var uppiborin, og við málinum legði Ronaldo seg ovast á máltindin í HM-kappingini við seks málum. Brasilia hevur nú møguleikan at vinna HM-heitið á fimta sinni. Finalistarnir Týskland og Brasilia møtast fyri fyrstu ferð í HM-dysti sunnudagin og spennandi verður at síggja hvussu leikur fer fram. Týskland hevur ikki verið í HM-finalu síðan 1990, tá teir vunnu á Argentina í HM-kappingini í Italia. Brasilia fær nú møguleika at endurvinna HM-heitið, eftir at teir, sum verandi meistarar, taptu fyri Fraklandi.

3. ferð Cafu

Verður brasilski liðskiparin, Cafu, á vøllinum sunnudagin, verða hetta hansara triðja finala upp´í slag. Í HM-kappingini í USA varð hann innskiftur tíðliga í finaludystinum ímóti Italia og fýra ár seinni ímóti Fraklandi, var Cafu eisini.

Seinastu tíggju árini

Tað røkist fyri tveimum sera tøttum dystum í uppgerðunum, NSÍ-KÍ og VB-B36. Í øllum førum, um vit skulu trúgva hagtølunum, sum í báðum førum siga, at tað er rættiliga skiftandi, hvør vinnur júst hesar uppgerðirnar, samstundis sum talan vanliga er um sera tættar dystir.

Hinvegin tykist ikki tann stóri spenningurin vera um, hvussu fer at gangast, tá GÍ-EB/Streymur og HB-TB fara at takast. Hagtølini kunnu tó bert siga okkum, hvussu tað hevur gingist seinnu árini. Tá tosað verður um, hvussu fer at gangast sunnudagin, er støðan kanska ein heilt onnur.

Talvan niðanfyri sýnir, hvussu úrslitini hava verið, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini.

	'01	'00	'99	'98	'97	'96	'95	'94	'93	'92	Í alt	
GÍ-EB/S	4-0	-	-	-	-	-	-	9-0	-	-	2-0-0	13-0
HB-TB	-	-	-	4-3	-	7-1	4-1	7-0	2-1	0-0	5-1-0	24-6
NSÍ-KÍ	3-2	2-1	1-3	0-0	0-2	-	1-2	2-1	-	1-0	10-11	18-10
VB-B36	2-1	1-0	0-0	1-1	1-2	1-3	1-2	-	0-1	0-0	2-3-4	7-10
Skála-B68	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-	0-0-0	0-0